

# Todi millum teir bestu í Superliguni nakrantíð

Todi Jónsson er ein tann sterkasti álopsspælarin í superliguni nakrantíð. Tað heldur danska Ekstrablaðið, sum hevur gjørt ein lista við teimum størstu profilunum í superliguni gjøgnum árini. Ekstrablaðið heldur, at fyrrverandi danski landsliðsspælarin Ebbe Sander størsti profilurin, sum hevur verið í superliguni. Síðani hevur blaðið gjørt ein lista við 100 spælarum, og ein av spælarunum á listanum er føroyski álopsspælarin Todi Jónsson, sum er nummar 76. - Toda er ein av sterkastu álopsspælarunum í søguni hjá superliguni. Føroyingurin var skjótur á fótum og á avtrekkjaranum, skrivar Ekstrablaðið.

# Kann kosta dýrt

**Í UEFA eru fíggjarligu krøvini til feløgini strong, og tí kann ein húsagangur kosta dýrt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyski limaskapurin í UEFA ásetur millum annað krøv til Formula-feløgini um, at fíggjarviðurskiftini hjá feløgunum skulu vera greið. Millum annað verður hetta gjørt við at geva feløgunum loyvisgóðkenning á hvørjum ári.

- Tað eru ikki ítøkiligar reglur fyri, hvussu vit í Føroyum gera, um eitt felag fer á húsagang. Hinvegin hava vit praktisera, at um felag verður umskipað, ella um talan er um samanlegging, kann hetta bert gerast, um framhaldandi felagið yvirtekur allar skyldur hjá uppathaldandi felagnum ella feløgunum, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF.



*Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF*

Í Danmark hava dømi tó verið um feløg, sum eru tvangsniðurflutt til lægri deild, tí fíggjarligu skyldurnar ikki verða svaraðar. Og spurningurin er, um FSF hevur so øgiliga nógvar aðrar møguleikar, skuldi tað komið hartil. Í øllum førum skal eitt nýtt felag, sum ikki yvirtekur ein verandi lisens, byrja av nýggjum í lægstu deildini.

Og so eru tað eisini UEFA-krøvini at taka atlit til. Hesi staðfesta, at um felag fer av knóranum, missur felagið rættin til at taka lut í europiskum kappingum í trý ár. Og avleiðingin er tann sama, um felagið verður fíggjarliga umskipað við at lata skyldurnar liggja eftir í gamla felagnum og halda fram við rakstrinum í nýggjum felag.

# Tvey met í einum til Pál

EM í svimjing fekk ein virðiligan enda fyri føroyska liðið. Seinasti svimjari í hylinum sunnumorgun var Pál Joensen, ið svam 200 frísvimjing. Tað gjørdi hann so sannlilig til fulnar føroyskt met á teimum fyrstu 100 metrunum við tíðini 0:51,82 og endatíðin uppá 1:46,61 eisini føroyskt met. Pál gjørdist nr. 28 av 62

Innan kappingina hjá Páli hevði Mona Simonsen svomið 200 metra frísvimjing, hon fekk tíðina 2.10,25, ið er 27 hundraðpartar seinni enn tilmeldingartíðin.

Við portalin segði Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, at talan hevur verið um eina heilt góða kapping fyri alt liðið.

**Samanlagt settu føroysku svimjararnir seks met í Kroatia, og vóru hesi:**

- Shaila millum Garðarnar: 26.49 í 50 frí - føroyskt met
- Pál Joensen: 51.82 í 100 frí - føroyskt met (útlegg á 200)
- Pál Joensen: 1:46.61 í 200 frí - føroyskt met
- Pál Joensen: 3:42.57 í 400 frí - føroyskt met
- Pál Joensen: 7:48.56 í 800 frí - føroyskt met (útlegg á 1500)
- Pál Joensen: 14:39.99 í 1500 frí - føroyskt met, besta juniortíð í heiminum nakrantíð




*Hóast hann mátti taka til takkar við einum plássi sum nummar fimm í Europa, so var tíðin hjá Pál Joensen skjótasta junior-tíð nakran tíð á teininum*

